# Her trívast vit væl

**Í fleiri enn 40 ár hava nakrir mans í Havn hitst til morgunkaffi hvønn einasta gerandismorgun. At kalla øll hesi árini hevur kaffið verið drukkið á Kondittarínum, men nú hava teir flutt oman á Sjómansheimið, har teir trívast stak væl**

KAFFIPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Átta av monnunum, sum hvønn morgun hittast til morgunkaffi á Sjómansheiminum. Frá vinstru eru tað Heðin Hammer, Jan Christiansen, Niels Pauli Hjaltalin, Andrias Rein, Jørleif Kúrberg, Baldvin Baldvinsson, Høgni Mikkelsen og Ingi Mohr*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Teir hava longu funnið sær sess við morgunmatarborðið í Galluni á Sjómansheiminum, tá ið vit klokkan gott níggju mikumorgunin leita okkum yvir um Tórsgøtu at fáa eitt prát við hesar menninar, sum nú í ein mansaldur dagliga hava hitst til morgunkaffi. Tá ið vit koma, eru teir átta í tali, men løtu seinni koma tveir afturat, og so er við at verða fult.

### Kondittaríið misti sína sjarmu

Men hvussu ber tað til, at teir fluttu oman á Sjómansheimið, aftaná at hava hildið til á Kondittaríinum í ein mansaldur?

- Har komu nýggir eigarar til, og tá misti Kondittaríið fullkomiliga sítt innihald, og tað segði okkum einki til síðst. Broytingarnar vóru alt ov stórar, og tænastan var alt ov vánalig. Mangan var eingin viðskeri til rundstykkini, og reinførið var heldur ikki í lagi, so vit kendu okkum ikki heima har longur, siga kaffimenninir.

Leiðin gekk síðani oman á Sjómansheimið, og har hava teir kent seg vælkomnar frá fyrsta degi av, og tænastan er framúr góð.

- Her er gott at verða. Vit eru framvegis mitt í býnum, og her eru góð parkeringsviðurskifti. Í mun til Kondittaríið er her eisini eitt sindur luftigari, og vit síggja bátar og skip, sum eru á Havnarvág, sigur Jørleif Kúrberg, ein av veteranunum.

### Hildu veitslu fyri damunum á Kondittaríinum

Flestu havnarborgarar minnast damurnar, sum í ein mansaldur arbeiddu á Kondittaríinum, og seinni yvirtóku raksturin av kaffistaðnum. Tá ið hesar løgdu frá sær, avgjørdu trúfastu kaffigestirnir at halda eina sonevnda „avskeðsveitslu“ fyri teimum.

- Vit bjóðaðu teimum á veitslu á Hotel Vágum. Vit leigaðu ein buss vestur í Vágar, har vit hildu eina veitslu. Minnist meg rætt, so vóru vit ikki færri enn 29 fólk, greiðir Baldvin Baldvinsson frá. Hann heldur, at tá ið hesar damur góvust, var andin á Kondittaríinum ikki tann sami.

Onkur av kaffimonnunum heldur skemtandi fyr, at Tórshavnar Býráð heldur skuldi keypt Kondittaríið ístaðin fyri Degnshús.

### Pláss fyri øllum

Tað eru ongar upptøkutreytir fyri at verða við til morgunkaffi á Sjómansheiminum. Kaffimenninir greiða frá, at pláss er fyri øll, óansæð politiska sannføring, um tað er B36'ari ella HB'ari, ella átrúnaðarliga sannføring.

- Her eru bæði sosialistar og kapitalistar, og tað er eingin forðing. Tá ið fótbólturin er í gongd, verður til dømis nógv tosað um tað, og tað er ikki frítt, at man prikar hvønnannan. Vit kjakast um øll møgulig mál, bæði stór og smá, og óansæð um vit hava skil fyri tí ella ikki. Onkuntíð gongur tað eitt sindur harðliga fyri seg. Kjakið kann verða bæði seriøst, men sanniliga eisini óseriøst, siga kaffimenninir.

Hendan morgunin vit vitja, hevur kjakast verið um útvarpið, ið teir als ikki eru nøgdir við, og onkur røvarasøga er eisini fortald.

### Longsul í frítíðini

Sum øll onnur leita hesir kaffimenninir sær av og á av landinum, og tá er longsulin eftir hugnaløtunum stórur.

- Ert tú burturstaddur, so kennir tú beinan vegin ein longsul eftir prátinum við kaffiborðið. Tað er nakað heilt serligt, og vit høvdu als ikki klárað at verið tað fyriuttan. Vit hava havt hesa siðvenju í ein mansaldur, og hon fer ikki at detta niðurfyri, siga teir.

Alt bendir eisini á, at teir eru komnir oman á Sjómansheimið fyri at verða, og teir rýma neyvan, fyrr enn teir á ellisárum møguliga fara at flyta stutta teinin yvir í Undirhúsið í Vágsbotni, har nógvir eldri havnarmenn dagliga hittast til eitt prát og kortspæl.

"Eingin framtíð er í starvinum, framtíðin er í starvsfólkinum"
George Crane



**Størv á Føroya Tele**

**Søkt verður eftir tveimum lærlingum til Telebúðirnar í Runavík og Klaksvík at byrja skjótast gjørligt.**

**Søkt verður eftir barnsburðaravloysara til Telebúðina á Tvøroyri at byrja skjótast gjørligt.**

Meira fæst at vita á heimasíðuni www.ft.fo

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarúgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dótturfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 105 fólk. Tænastur fra FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

Øllum okkara viðskiftafólki og samstarvsfeløgum ynskja vit eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.

Vit takka fyri gott samstarv í farna ári og vóna at fáa eitt eins gott samstarv í komandi ári.

SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

Skrivstovan er stongd fríggjadagin 23/12.
27/12 er skrivstovan opin frá kl. 13.00